## Rendi á bryggjuna

Ferjan "Christian IV" hjá reiðarínum Color Line rendi sunnukvøldið á bryggjuna í Hanstholm. Ferjan bar eisini við ein trolara, sum lá við bryggju.

Color Line sigur, at streymslit umborð var orsøkin til óhappið. Umleið 1.200 ferðafólk vóru við "Christiani IV", og tey noyddust at bíða ein hálvan tíma í myrkri eftir, at streymurin kom aftur.

Eingin fekk skaða av óhappinum. Color Line gjørdi kortini av at lata ferjuna liggja í Hanstholm fyri náttina, tí illveður var nógvastaðni í Danmark sunnukvøldið og gjáranáttina.

## Lula vann stórsigur

Tann 57 ára gamli fyrrverandi fakfelagsformaðurin Luiz Inacio Lula da Silva vann sunnudagin brasilska forsetavalið. Hann fekk 61 prosent av atkvøðunum og verður tann fyrsti sosialistiski forsetin í Brasil.

Lula, sum hann vanliga verður róptur, fekk 52 milliónir atkvøður. Tað er munandi meiri, enn nakar av undanmonnum hansara hevur fingið, og tað er næstan met í einum demokratiskum landi. Metið eigur fyrrverandi amerikanski forsetin Ronald Reagan, sum fekk 54,3 milliónir atkvøður, tá hann varð afturvaldur á forsetavalinum í 1984.

Tað vóru serliga tey fátæku og miðalstættin, sum valdu sosialistin Lula. Tey halda, at hann er tann rætti maðurin til at skapa betri javna í brasilska samfelagnum. Vinnulívið og fíggjarheimurin høvdu haraftur-ímóti mælt fólki frá av velja Lula, og útlendskir íleggjarar høvdu hótt við at taka seg úr Brasil, varð hann valdur.

## Skrivað testamenti

Eitt arabiskt blað, sum verður givið út í London, prentaði sunnudagin eitt testamenti, sum sambært blaðnum er testamentið hjá yvirgangsleiðaranum Osama bin Laden.

Í testamentinum verður funnist at fleiri arabiskum londum, tí tey hava ikki stuðlað felagsskapinum al-Qaeda í bardaganum ímóti teimum vantrúgvandi. Fyrrverandi Taliban-stýrið í Afghanistan fær eisini eina skortfleingju, tí tað flýddi undan fíggindanum ístaðin fyri at berjast ímóti honum.

Testamentið í arabiska blaðnum er dagfest tann 14. desember í fjør, men blaðið vil ikki siga, hvussu tað hevur fingið fatur á skjalinum.

## Danir slakaðu ikki

Danska stjórnin sýtti um vikuskiftið fyri at slaka fyri russisku stjórnini, sum hevði kravt, at ein heimsráðstevna um Kekenia, sum skuldi haldast í Keypmannahavn, skuldi avlýsast. Russar vóru so illir um ráðstevnuna, at Vladimir Putin, forseti hótti við at boykotta toppfundin millum ES og Russland í Keypmannahavn í næsta mánað.

Hesum seinna selst væntandi undan, tí danska stjórnin valdi at flyta toppfundin millum ES og Russland úr Keypmannahavn til Bruxelles.

Per Stig Møller, uttanríkisráðharri sigur, at stjórnin kundi ikki forða heimsráðstevnuni um Kekenia, tí tað eru privatfólk, sum skipa fyri henni. At banna tiltakinum hevði verið brot á grundlógina, sigur uttanríkisráðharrin, sum heldur, at stjórnin fann eina skilagóða loysn á ósemjuni við Russland.

# Russar brutu kanska altjóða samtykt um kemisk vápn



*Ein av kvinnunum, sum var millum kekensku gíslarænararnar, situr deyð í einum stóli í leikhúsinum. Kvinnurnar høvdu spreingiløðing uppi á sær.*

**Tað tykist vera ein gáta, hvat tað var fyri gass, sum russar nýttu, tá teir lupu á leikhúsið í Moskva**

GÍSLATØKAN Í MOSKVA
*Árni Joensen*

Allastaðni verður dúgliga gitt, hvat tað var fyri gass, sum russar sprændu inn í leikhúsið í Moskva, áðrenn teir russisku hermenninir lupu á fyri at fría teir umleið 800 gíslarnar, sum teir kekensku uppreistrarmenninir høvdu tikið.

Amnesty International sigur tað vera sera umráðandi at fáa staðfest, hvat tað var fyri evni, sum russar nýttu. Judith Arena, talskvinna hjá Amnesty International segði við BBC í gjár, at felagsskapurin fer at leggja trýst á teir russisku myndugleikarnar fyri at fáa teir at upplýsa, hvat slag av gassi talan var um.

-Vit vilja hava at vita, um tað var rætt at nýta hetta slagið av gassi, og um tað var lógligt, segði talskvinnan hjá Amnesty International.

Ein amerikanskur serfrøðingur, Christopher Holstege á lærda háskúlanum í Virginia, segði við tíðindastovuna AP, at tað fyrsta, sum rann sær í huga, tá hann frætti tíðindini, var, at russar mundu hava nýtt okkurt doyvandi evni sum eitt nú valium. Ein fyrrverandi embætismaður í russiska verjumálaráðnum, Vitalij Sjkilov, heldur, at russar nýttu eitt slag av BZ-gassi, sum er eitt nervagass. Í USA sigur Christopher Holstege, at hetta er eisini væl hugsandi.

Er tað rætt, at russar nýttu BZ-gass ella okkurt tilsvarandi, kann tað vera brot á altjóða samtyktina um kemisk vápn, sum Russland staðfesti í 1997.

-Tað kemur ikki óvart á okkum, at russar hava slík evni, sigur amerikanski vápnaserfrøðingurin Ron Madrid. Hann sigur, at russar nýttu umleið 30 ár til at gera BZ-gass.

Tann kendi russiski hernaðarserfrøðingurin Pavel Felhengauer heldur, at russar nýttu eitt ella annað loyniligt slag av gassi, sum stavar frá gamla Sovjetsamveldinum, men sum ongar almennar upplýsingar eru um. Sjálvur heldur Pavel Falhengauer, at kanska var LSD í gassinum, sum varð sprænt inn í leikhúsið.

# Illveður í Norðurevropa

**Minst 27 fólk doyðu í illveðri í pørtum av Norðurevropa um vikuskiftið**

ILLVEÐUR
*Árni Joensen*

Illveðrið stóðst av einum djúpum lágtrýsti, sum kom inn yvir Bretland, haðani tað helst leiðina fram eystureftir.

Í Bretlandi doyðu seks fólk sunnudagin í illveðrinum. Teirra millum vóru ein 22 ára gomul kvinna í Oxford og systrar hennara, sum vóru trettan og níggju ára gamlar. Tær doyðu, tá eitt træ datt oman yvir bilin, sum tær vóru í.

Í Niðurlondum doyðu fýra fólk, teirra millum tveir belgiskir kavarar. Eisini í Fraklandi doyðu fýra fólk, og í Týsklandi søgdu myndugleikarnir í gjár, at har hevði illveðrið kravt í hvussu er sjey mannalív. Í Eysturríki doyðu tvey eldri fólk, í Sveits doyði ein ung kvinna, og í Belgia doyði ein trettan ára gomul genta.

Uttan fyri Portsmouth í Suðuronglandi stoyttu ein ferja og eitt spildurnýtt herskip saman. Herskipið fekk so mikið stóran skaða, at tað mátti fáast í dokk.

Tann mesti vindurin var sunnan fyri lágtrýstið, og tað gjørdi, at Danmark varð ikki so meint rakt av illveðrinum. Nógvur vindur var kortini sunnukvøldið og mánanáttina í syðra og eystara parti av Danmark, og vindferðin kom upp í 30 metrar um sekundið.

# Flogfar til 800 ferðafólk

**Tað fyrsta Airbus A380 skal eftir ætlanini á flog í 2006**

FLOGFERÐSLA
*Árni Joensen*

Flogverksmiðjan Airbus, sum hevur høvuðssæti í Tolouse í Fraklandi, ætlar í fyrsta umfari at smíða nøkur flogfør, sum skulu taka 600 ferðafólk, men næsta stigið verður at smíða flogfør til 800 ferðafólk.

Nýggja flogfarið skal eftir ætlanini flúgva 16.000 kilometrar við einum brennievnistanga, og tað merkir m. a., at flogfarið kann flúgva úr Keypmannahavn til Sidney í Avstralia uttan at millumlenda.

Samstundis arbeiðir amerikanska Boeing-verksmiðjan við at gera eitt flogfar, sum skal flúgva væl skjótari enn Concorde, sum í dag er heimsins skjótasta ferðamannaflogfar. Tað fer m. a. at bera í sær, at flogtíðin úr Keypmannahavn til New York verður stytt tveir tímar. Nýggja amerikanska flogfarið fer at taka 250 ferðafólk.

Nýggja amerikanska flogfarið kemur á marknaðin í 2008.

# ítróttur

Nr. 207 • týsdagur • 29. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ungarn vil spæla ímóti Føroyum



*Føroyska avrikið ímóti Týsklandi hevur vakt stóran ans í fótbóltsheiminum, og nú vil Ungarn sleppa at royna seg móti okkara A-landsliðið*

**Eftir góða avrikið í Týsklandi tykist áhugin fyri at spæla vinardystir ímóti føroyska fótbóltslandsliðnum at vera størri, enn hann hevur verið**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Føroyska fótbóltslandsliðið er meiri áhugavert sum mótstøðulið í vinardystum, enn tað áður hevur verið. Tað hava verið ábendingar um hetta síðstu árini, og nú hevur FSF aftur fingið eina ítøkiliga staðfesting av hesum.

– Vit hava fingið tilboð úr Ungarn um at koma niður hagar at spæla vinardyst. Uppleggið hjá teimum er, at landsliðið skal spæla í Budapest leygardagin 30. november, sigur Ísak Mikladal, sum hesa seinastu vikuna hevur samskift við ungverska fótbóltssambandið og landsliðsvenjaran.

Taka tit av?

– Endalig støða er ikki tikin, men av givnum orsøkum bendir alt á, at tað verður eingin dystur í Budapest 30. november. Spælararnir hjá okkum eru í vetrarfrí, og teir fara ikki undir aftur venjingarnar fyrrenn eftir ársskiftið. Men vit hava skotið upp fyri ungverjunum, at dysturin í staðin verður spældur eina ferð í vár. Vit hava nevnt mikudagin 30. apríl sum ein møguleika. Teir venda hesum møguleikanum í løtuni, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandinum.

Tað hevur ikki verið tosað um møguleikan, at Ungarn skal vitja í Føroyum, eftir at Føroyar hava verið í Budapest. Ungarn er ein av europeisku fótbóltstjóðunum, sum Føroyar ikki áður hava spælt landsdyst ímóti.

### Lítil nytta

At Ungarn nú hevur vent sær til FSF við umbøn um vinardyst boðar frá, at aðrar tjóðir eftir føroyska avrikið í Týsklandi halda, at tað er perspektiv og nytta í at spæla ímóti Føroyum. Soleiðis hevur tað ikki altíð verið.

Nógvu tey fyrstu árini, tá Føroyar vóru við í altjóða fótbólti, var tað sera torført hjá fótbóltslandsliðnum at fáa avtalur í lag um vinardystir ímóti øðrum landsliðum. Orsøkin var eyðsýniliga tann, at tær flestu europeisku fótbóltstjóðirnar mettu, at Føroyar ikki vóru serliga áhugaverdar sum mótstøðulið. Tað hevur týdning, at nytta fæst burturúr vinardystum, soleiðis at venjararnir og spælararnir eftir dystirnar vita meiri um, hvussu teir skulu gera og ikki gera, tá teir skulu undir týdningarmiklar uppgávur í undankappingum.

Umframt vinardystir ímóti Íslandi og dystir ímóti Kanada í Gundadali og í Klaksvík, so spældu Føroyar í 1992 og í 1993 tveir vinardystir ímóti Noregi. Dysturin í 1992 varð spældur í Oslo. Noreg vann 2–0. Árið eftir var Noreg í Føroyum, og norðmenn vunnu 7–0. Egil Drillo Olsen var norskur landsliðsvenjari tá. Eftir skrædlið á Svangaskarði legði hann ikki fingrarnar ímillum. Hann segði við norsku fjølmiðlarnar, at hann metti ferðina til Føroya at vera spill av orku og tíð. Mótstøðan hevði verið so mikið lítil og primitiv, at hann og spælararnir einki vórðu vornir klókari, og tað hevði verið endamálið við ferðini. Ikki at vita um Noreg átti eitt betri landslið enn Føroyar, tí tað vistu teir frammanundan, segði Egil Drillo Olsen.

Síðani hava Føroyar staðið seg alt betri í undankappingunum, og tað tykist síggjast aftur í tilboðunum um vinardystir.

### Eingin NM kapping

Umframt undankappingardystirnar ímóti Íslandi, Týsklandi, Skotlandi og Litava, sum eru á skránni næsta ár, so verður vónað og kanska rokna við, at Føroyar skulu spæla onkrar vinardystir.

Seinnu árini hevur landsliðið verið á venjingarlegum á Kypros og í Spania. Soleiðis verður tað eisini komandi ár. Venjingarlegan plagar at vera um mánaðarskiftið januar/februar. Soleiðis verður tað ivaleyst eisini næsta ár, men enn er eingin avgerð tikin um hetta.

Síðst var venjingarlegan á Kypros, har Føroyar spældu vinardystir ímóti Póllandi og Liktinstein. Tvey tey undanfarnu árini vóru venjingarlegurnar í Spania, har dystir í NM kappingini vórðu spældir ímóti Finnlandi og Íslandi. Upprunaliga var ætlanin, at tað skuldi haldast fram við NM kappingini. Men nú tykist hetta at vera dottið niður fyri. Dysturin hjá Føroyum ímóti Noregi í fyrstu kappingini varð ongantíð spældur, og tað er ikki farið undir nýggja kapping.

– Hjá stóru londunum tóktist kappingin ikki at verða raðfest, sum hon var hjá eitt nú okkum og íslendingum, og hesa seinastu tíðina hava vit einki hoyrt um, at ætlanin er at fara undir nýggja NM kapping, sigur Ísak Mikladal.

Í FSF hava teir mett, at virðið í venjingarleguni varð størri, um altjóða skrásettir landsdystir vóru á skránni.

– Tað er felagið, sum eigur rættindini at sjónvarpa dystirnar hjá okkum, sum stílar fyri. Teir hava avtalur við nógv fótbóltssambond í Europa. Tí er tað ikki so torført hjá teimum at syrgja fyri, at landsdystir verða lagdir í sambandi við venjingarleguna hjá okkum, sigur Ísak Mikladal, sum samstundis undirstrikar, at teir í FSF ikki enn duga at siga, um nakar landsdystur verður í vár.

### Allan Simonsen spøkir

Síðani Allan Simonsen fór úr Føroyum og gjørdist landsliðsvenjari í Luksemborg, hevur møguleikin fleiri ferð verið nevndur, at Føroyar og Luksemborg hittust í vinardysti. Sambært Ísaki Mikladal kenna teir í FSF eisini til hesa hugsanina.

– Allan hevur spurt seg fyri hjá okkum. Luksemborg skal á venjingarlegu við Miðalhavið eina ferð eftir ársskiftið. Allan Simonsen er áhugaður í, at venjingarlegan hjá honum og hansara monnum verður á sama staði og um somu tíð, sum okkara lið fer á venjingarlegu, og at ein dystur verður spældur ímillum Føroyar og Luksemborg. Eingin avtala er gjørd um hetta, og vit duga ikki enn at siga, hvussu tað verður við hesum. Sjónvarpsfelagið, sum eigur rættindini til okkara dystir, eigur eisini rættindini til dystirnar hjá Luksemborg, so tað er fyrst og fremst upp til tað felagið at gera av, um talan verður um nakran dyst, sigur Ísak Mikladal.